# Magni vildi ikki gevast

**Konsertin við Magna Christiansen í Mentanarhúsinum í Fuglafirði vardi í næstan tríggjar tímar. Lagið var óføra gott millum fólk, og høvuðspersónurin sjálvur fekk mest sum ikki afturhald**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Magni Christiansen var í rætta essinum, tá ið hann hevði konsert í Fuglafirði leygarkvøldið.

Stóra country og gopel-konsertin gjørdist ikki bara stór, hon gjørdist eisini drúgv, og tað hevði eingin nakað ímóti.

Magni Christiansen fór á pallin stutt eftir klokkan átta, og hann helmaði ikki í fyrr enn klokkan var við at gerast ellivu.

Hann hevði ein stuttan steðg undir konsertini, men annars var hann miðdepilin á pallinum. Hann sang stillar gospelsangir, lívligar countrysangir, og so fekk hann sjálvur, Shakin Stevens, eisini rásarúm í skránni.



*Magni Christiansen var væl fyri, og hann helt áfram at spæla í næstan tríggjar tímar*



*Magni Christiansen framførdi eisini okkurt hjá hetjuni hjá sær, Shakin Stevens*

### Tað besta burtur úr løtuni

31 ára gamli Magni Christiansen hevur seinnu árini verið millum fremstu gospelsangararnar í landinum. Hann hevur givið tríggar fløgur út, og nú kemur tann fjórða útgávan fyrsta dagin.

Gospelsangarin úr Kvívík hevur spælt nógv seinastu tíðina, og hann er væl dámdur. Hann dugir væl at fáa tað besta burtur úr løtuni – um tað so skal gerast við stillum gospeltónleiki ella svingandi country hjá fyrimyndunum úr statunum.

Soleiðis var eisini í Fuglafirði leygarkvøldið. Tey stívliga 300 fólkini fingu eina óføra góða og fjølbroytta konsert.

Áhoyrararnir vóru í øllm aldri – bæði børn, ung, tilkomin og eisini fleiri eldri fólk vóru komin at lurta, og tey fingu tríggjar góðar tímar saman við Magna Christiansen og hansara tónleikarum

### Nógvir tónleikarar

Bólkurin hjá Magna var mannaður við royndum og ungum tónleikarum, og samansetingin riggaði væl.

Heili 12 fólk vóru á pallinum: Ólavur Øster gittar, Dánjal Zachariassen trummur, Eydun Johannesen bass, Jákup Zachariassen steel gittar, Pætur Dahl Christiansen gittar, Jóhannes Ólavsson tangentar, Daniel Nielsen violin, Petur Háberg Jacobsen akk. gittar og kór, Elin Madsen kór og Vivi Hammer kór.

Øll gjørdu sítt til, at framførslan hepnaðist væl – alt frá tí róliga og væl spælandi Ólavi Øster til tann unga og framfýsna violinspælaran Daniel Nielsen.

Tey spældu kendar sálmar, countrysangir hjá monnum sum Buck Owens, Randy Travis og Alan Jackson.

### Hvat við Shakin Stevens?

Magni Christiansen er ikki bara kendur sum gospelsangari. Hann er eisini kendur sum íðin fótbóltsfjeppari, og so er tað alt hatta við Shakin Stevens. Popptónleikarin, sum í áttatiárunum pløgdi allar hittlistarnar ígjøgnum við sínum lívliga og meinaleysa poppi, hevur vunnið hjartað á Magna Christiansen, og tá Magni var klappaður uppaftur til eykanummar, var einki at gera.

Tá stóð Shakin Stevens á skránni, og tað var ein fínur endi á eini góðari konsert, har fólk ikki keddu seg eina løtu, hóast konsertin gjørdist drúgv.

Um stutta tíð ber til at uppliva Magna Christiansen á fløguni »Eg gleðist so hvørt jólakvøld«.



*Í næstu kemur nýggj fløga við Magna Christiansen út*



*Áhoyrararnir, sum vóru um 300 í tali, fingu ein frálíka konsert, og teir vildu eisini hava eykanummar*



*12 tónleikarar vóru á pallinum til konsertina í Fuglafirði*

# Postgjaldið bíligari enn vaktarfólk

**Tað telur meira fyri Vágatunnilin, at postgjaldið fyri at senda rokningar út, verður bíligari enn vaktarfólk við tunnilsmunnan alt samdøgurðið, enn tað, at nevndarformaðurin eisini er Postverksstjóri, sigur stjórin fyri Vágatunlinum**

TUNNILSGJALD
*Edvard Joensen*

**Vágar:** Tað, sum avgerandi er fyri leiðsluna í Vágatunlinum viðvíkjandi nýggju innkrevjingarskipanini er at fáa hana so bíliga í rakstri, sum gjørligt. At rokningar verða sendar við Postverkinum, har nevndarformaðurin fyri Vágatunlinum er stjóri, heldur Dávur Reinert Hansen, stjóri fyri Vágatunlinum, ikki vera tann stóra trupulleikan.

– Vit hava eitt postverk í Føroyum, sum tekur sær av at bera brøv út, og tað brúka vit so, sigur hann.

Men tað, sum mest umráðandi er, sigur stjórin, er tað, at hendan nýggja skipanin verður bíligari enn tann ófrívilliga skipanin, sum verið hevur, har fólk hevur staðið vakt við tunnilsmunnan dag og nátt.

Nú er stutt fráliðið, síðan nýggja innkrevjingarskipanin varð sett í verk, og hon tykist at rigga væl, sigur Dávur Reinert Hansen.

Bilarnir koyra nú allir í einum rað, og eingin bíðirøð er longur, sum seinkar teimum, sum ikki hava kubba.




*Hetta er nú søga. Nýggj gjaldskipan er sett í verk við Vágatunnilin, sum ger tað óneyðugt at hava vaktarfólk gangandi við tunnilin nátt og dag*

*Mynd: Edvard Joensen*

### Nógv taka seðil

Ført hevur verið fram, at tey, sum ikki hava kubba, kunnu sleppa undan at gjalda, tí eingin møguleiki er fyri at gjalda við sjálva støðina.

Men hesum er stjórin fyri Vágatunlinum ikki samdur við. Hann sigur, at tað verður neyvt skrásett, hvør koyrir gjøgnum tunnilin, og so verða rokningarnar sendar út. Og tað er ikki tann øgiligi munurin í mun til tað, sum verið hevur, tí rímiliga nógv teirra, sum koyrdu gjøgnum tunnilin uttan kubba, valdu at taka ein seðil við og síðani gjalda seinni.

Nýggja skipanin legur upp til, at fólk kunnu fara inn á einahvørja bensinstøð at gjalda fyri túrin, tey hava verið gjøgnum Vágatunnilin. Í øðrum lagi kunnu tey bíða, til tey hava fingið rokning sendandi.

Dávur Reinert Hansen ásannar, at tað eru ikki nógv, sum velja at fara á bensinsstøðirnar at gjalda. Men hann metir ikki, at útreiðslurnar til postgjald fara at hækka munandi í mun til tað, sum fyrr var, tí tá var tann parturin, sum valdi at taka seðilin við sær, eisini rímilig stórur.

### Upplýsa

Ein annar trupulleiki, sum fleiri síggja fyri sær við hesi nýggju skipanini, eru teir útlendsku bilarnir, sum koyra gjøgnum tunnilin. Serliga verður hetta galdandi um summarið.

Um nú teir velja at bíða við gjaldinum, kann tað gerast trupult at finna teir aftur, tá teir eru farnir av aftur landinum, siga tey atfinningarsomu.

Jú, tað ásannar stjórin, men leggur dent á, at enn hevur hesin trupulleikin ikki verið tann stóri av teirri einfaldu orsøk, at tað eru fáir fremmandi bilar í landinum hesa tíðina.

– Vit leggja stóran dent á at upplýsa um hesa skipanina og fáa sagt fremmandafolki frá teimum møguleikum, sum eru at gjalda, sigur Dávur Reinert Hansen. So mugu vit bara vóna, at tað fer at bera til.

Um góðar 14 dagar eru tvey ár liðin, síðan Vágatunnilin varð latin upp fyri ferðslu, og alla hesa tíðina hevur ólag verið á gjaldskipanini. Bara kubbaskipanin hevur virkað nøktandi.

Sjálvandi hevur leiðslan eisini kent sviðan av hesum trupulleikanum, men kortini ikki sum nakra hóttan móti teirra tilveru, sigur stjórin. Nú vónar leiðslan so, at henda nýggja skipanin fer at roynast betri, sigur hann.

Norðoyartunnilin er komin væl ávegis, og har skal so eisini ein gjaldskipan finnast. Nú verður hendan nýggja skipanin í Vágum royndd, og roynist hon væl, fer hon helst eisini at verða rúkt í Norðoyartunlinum, tá tann tíð kemur, sigur Dávur Reinert Hansen.

# Strangari krøv til tyrluna

**Strangari myndugleikakrøv ger, at neyðugt verður at hugsa um at skifta gomlu tyrluna út, sigur stjórin á Atlantsflogi, Magni Arge. Tað er tó ikki Atlantsflog, men Føroya Landsstýri, sum eigur tyrluna**

FLÚGVING
*Edvard Joensen*

Eldra tyrlan,sum Atlantsflog millum brúkar til ferðafólkaflúgving, hevur nátt slíkum aldri, at krøvini fara at herðast. Tí verður neyðugt at hugsa um at skifta hana út, sigur Magni Arge, stjóri á Atlantsflog. Hann leggur tó dent á, at tyrlan er í góðum standi og trygg at ferðast við.

Tað er tó ikki Atlantsflog, men Føroya Landsstýri, sum eigur tyrluna, sigur hann. Og hann hevur ikki nakrar ítøkiligar ætlanir í løtuni um útskifting, og veit heldur ikki um, at Innlendismálaráðið hevur nakrar slíkar.

Magni Arge váttar, at gamla tyrlan fyri fýra árum síðan fekk eina umvæling fyri einar fimm milliónir krónur.

Men tað hevur so aftur gjørt, at hon í dag er í heilt góðum standi og lýkur øll tey krøv, sum sett verða henni.

Tað hevur verið frammi, at tyrlan næsta ár verður skerd munandi, soleiðis at skilja, at hon tá ikki fær loyvi til at flyta fleiri enn átta ferðafólk.

Men tað er ikki rætt, sigur Magni Arge. Hann ásannar, at tað hava verið krøv uppi um tiltøk í 2005, men at tað nú er flutt fram til 2009. Og tá verður tyrlan so aftur tað eldri, at upp aftur meira grund er til at hugsa um útskifting, sigur hann.

Men hetta er ikki øðrvísi, enn tað er alla tíðina. Tað verður støðugt hugt eftir, hvat er á marknaðinum, og nær sum frægast fæst burtur úr einum møguligum handli, sigur Magni Arge.



*Gamla tyrlan, sum Atlantsflog rekur, er komin so mikið til árs, at myndugleikalrøvini til hennara herðast alt meir. Tí verður neyðugt at hugsa um, hvat gerast skal, tá nýggjar treytir verða lagdar á um eini fimm ár, sigur sjtórin í Atlantsflog, sum tó leggur dent á, at tyrlar er í góðum standi og trygg at nýta*

*Savnsmynd*